# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Græshoppur og bøn. Kl. 11.00 Gudstænasta og kvøldmáltíð, J. V. Danielsen.

**»Tíð til Gud«**
Møti verður úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Drekkamuður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti við Øyvind Svendson frá UIO. Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti hjá Katrin og Ova Láaberg, Tórgarðsgøta 18. Øll eru vælkomin.

**Katólska kirkjan**
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa í Mariukirkjuni. Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti um missión í Venezuela. Símin í Túni og Ingvard Petersen greiða frá.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20.00 Húsmøti hjá Ellu og Jákup Jacobsen, Fútalág 33 kj., Havn.
Fríggjakvøldið kl. 18-20.00 ATAP Kids.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og sunnudagsskúli, eisini verður ungdómssigning. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Heimasíða okkara: www.koma.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20.00 í KFUM: Opið hús, fyri ung.

**Ebenezer**
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Jonny Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20.00 venur Manskórið.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Kvøldmøti v/ Ólavi Jacobsen.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Leygardagin kl. 20.00 Karismamøti í skúlaauluni við Hans Berntsen, biðið verður fyri sjúkum.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti í Saron við Steve Dulwich.
Mánadagin kl. 20.00 Bíbil- og bønarmøti.
Tlf. andaktin 424741.

**Filadelfia, Sundalagi**
Í morgin kl. 18.30 Alpha-Party.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Martin R. Jacobsen.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mikudagin 28. nov. kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar. Burturluting verður.

**Tjørnuvík**
Fríggjadagin kl. 20.00 Møti, Malmberg Olsen talar, Johanna, Halgerð og Marita syngja. Edelborg Petersen endar.
Leygardagin kl. 20.00 talar Dávur Thomasen. Manskórið í Kollafirði syngur. Innsavnan til Heimamissiónina. Kl. 18.00 talar Regin Høgnesen, Jónhild og Gullak syngja. Annelisa Andreasen endar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Saltangará**
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 17.00 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará.
Týsdagin kl. 19.00 Húsmøti í Lamba hjá Majvør og Heat. Verið hjartaliga vælkomin.

**Tvørkirkjuligt tiltak**
undir temanum »rúsevnis- & narkotikamisnýtsla millum ung« verður í róðrarneystinum á Glyvrum í kvøld 23. nov. kl. 23.00. Byrjað verður við at Regin Jørgensen greiðir frá. Tiltakið verður skipað sum bønarnátt. Øll eru vælkomin.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Bønarnátt fyri øll byrjar í kappróðrarneystinum hjá NSÍ í kvøld kl. 23.00.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Jógvan Petersen, Klaksvík. Evni: Hví skal eg ikki taka tað fyrsta glasið. Øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Sunnukvøldið kl. 18.00 verður familjumøti. Barnakórið »Eg eri ein K« og Absalon Áargarð úr Havn vitja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 21.00 Freak night. kl. 23-06 verður tvørkirkjulig bønarnátt í kappróðrarneystinum á Glyvrum.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús.
Suinnudagin kl. 17.00 Møti við Símun Jacobsen, kl. 17.00 Barnamøti. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgunin kl. 6 Bøn. Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Alphaskeið (13-18 ár).
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Fimmboga Poulsen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bíbliutími/bønarmøti.

**Sandoy**
Allir sjómanskvinnuringarnir í oynni samlast í missiónshúsinum á Sandi mánadagin 26. nov. kl. 19.30, sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 21.00 vitja Eirikur Skála og o.o. úr Hoyvík.
Sunnukvøldið kl. 20.00 verður møti í skúlahøllini í Trongisvági við Hans Berntsen og lovsangsbólki úr Hoyvík. Biðið verður fyri sjúkum.
Mánakvøldið 26. nov. kl. 20.00 verður møti í caféini við Ingu Berntsen, biðið verður fyri sjúkum.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.00. Ung úr Fuglafirði skipa fyri. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Karl og Helenu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Týsdagin kl. 20.00 Ungdómsfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Vikuskiftismøti verður leygarkvøldið kl. 20.00. Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Bæði kvøldini saman við Frelsunarherinum, ymiskir talarar og sangkreftir, øll eru hjartaliga vælkomin. Innsavnan sunnukvøldið.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við *Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 311391/261516*.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 19. nov.:*
kl. 10.00-10.15: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 10.15: Vit gera jóladekoratiónir og fyrireika jólasøluna í kjallaranum í næstu viku.
kl. 14.00-18.00: Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikudagin og fríggjadagin tlf. 316491
*Týsdagin 20. nov.:*
kl. 10.00–12.00: Vit baka til jóla
kl. 10.00–11.30: Sangur - Óli Vang/Beinta H. Jacobsen. **Øll eru hjartaliga vælkomin.**
kl. 15.00: »Tær báðar«. Vitjan frá Háskúlanum
*Mikudagin 21. nov.:*
kl. 10.00–12.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15.00: Túrur
*Hósdagin 22. nov.:*
kl. 10.30–11.00: Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00–17.00: Telduprát - Brandur Petersen
*Fríggjadagin 23. nov.:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð – Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur.
kl. 13.00-17.00 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Fuglafjørður – Eldrafelagið Borgin**
Hugnaløta verður í Felagslonini í Fuglafirði, hóskvøldið 29. nov. kl. 19.30.

**Føroyskt møti í Esbjerg**
Leygarkvøldið 24. nov. kl. 19.30 verður møti í Zionskirkens sognehus við Árant Johannesen.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00-21 og 22.30-23.30.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Al-anon**
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

**Blái Krossur**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

## 70 ÁR

Í dag, 23. november fyllir Johild Joensen, Froðba 70 ár. Dagurin verður hildin í húsum Tvøroyrar Handverkarafelags í kvøld frá kl. 19.00.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14. Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Kristnastova**
*Birmavej 36, København S,*
tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail: kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

**Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni**
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.



## FILMSTEIGURIN

# Harry Potter

Nú ber til at uppliva Harry Potter á hvíta tjaldinum. Samstundis sum triðja bókin í røðini er komin á føroyskum, fer Havnar Bio at sýna filmin um Harry Potter.

Tá Harry Potter er lítil drongur doyggja foreldur hansara á løgnan hátt. Harry yvirlivir, og í pannuna hevur hann fingið eitt arr, sum hevur skap sum snarljós. Hetta arr skal seinni fáa tydning fyri drongin, tá hann skal finna út av, hvat hendi hina vanlukku náttina.

Næstu 11 árini býr hann hjá ættfólki, har umstøðurnar eru vánaligar, og tað tjúkka systkinabarnið hjá honum órógvar nógv.

Tá Harry verður 11 ár kemur ein stórur maður at leita upp Harry. Tað er sum kennir hann Harry, og hann sigur dreinginum, at hann er sloppin inn á gandaskúla.

Hetta er byrjanin til eitt stórfingið ævintýr í einum heimi við síðuna av tí heimi, vit liva í. Har er einki, sum tað tykist at vera, men alt er, sum tað átti at vera.

Filmurin um Harry Potter hevur fingið sera góð skoðsmál í øðrum londum, og nú ber til at uppliva ævintýrfilmin her heima hjá okkum.

Í leiklutinum sum Harry Potter e Daniel Radcliffe.

Kendir sjónleikarar sum Richard Harris og John Cleese hava eisini leiklutir í filminum.











**Aldursmark: 7 ár. – Børn undir 10 ár sleppa tó bert inn um tey fylgjast við vaksnum**
**Frumsýning**
Fríggjadagin 23.11. kl. 16$^{15}$
Fríggjadagin 23.11. kl. 22$^{30}$
Leygardagin 24.11. kl. 19$^{30}$
Sunnudagin 25.11. kl. 16$^{00}$
Sunnudagin 25.11. kl. 22$^{30}$
Fríggjadagin 23.11. kl. 19$^{30}$
Leygardagin 24.11. kl. 16$^{15}$
Leygardagin 24.11. kl. 22$^{30}$
Sunnudagin 25.11. kl. 19$^{15}$
**Billettprísur: 65.- kr. –**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56




Fríggjadagin 23.11. kl. 23$^{15}$ Leygardagin 24.11. kl. 23$^{15}$
Sunnudagin 25.11. kl. 19$^{30}$




Fríggjadagin 23.11. kl. 20$^{30}$ Leygardagin 24.11. kl. 20$^{30}$
Sunnudagin 25.11. kl. 22$^{00}$




Fríggjadagin 23.11. kl. 18$^{00}$ Leygardagin 24.11. kl. 16$^{45}$
Sunnudagin 25.11. kl. 17$^{00}$

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning Fríggjadagin 30.11.**




**Frumsýning**
Mikudagin **19.12.** kl. 19$^{00}$ Mikudagin **19.12.** kl. 22$^{15}$
**Billettprísur: 70.- kr. – Forsølan er byrjað**